## Nýggj viðgerðarstova letur upp

Zonan kallast nýggj viðgerðarstova í zoneterapi, sum er latin upp í Havn. Zoneterapi – ella sonuviðgerð – er ein alternativur viðgerðarháttur, ið hevur til endamáls at geva javnvág aftur í likamið. Tað eru systrarnar Sonja Síminardóttir og Martha Sigurstein, ið hava tikið stig til nýggja virksemið. Tær tóku í 2001 útbúgving á á Vestegnens Zoneterapeutskole, ið er ein góðkendur skúli av SAB (Sammenslutningen af Alternative Behandlere), skriva tær báðar í tíðindaskrivi. Eisini eru tær í gongd við víðariútbúgving frá Innowell.



## Eivør »bleyt og keðilig«

Hetta tykist niðurstøðan at vera, tá Politiken ummælir nýggju fløguna hjá Eivør, »Human Child«. 2003 útgávun »Krákan« veður viðmæld til tey, ið vilja uppliva Eivør í sínum rætta elementi. Um nýggju fløguna sigur ummælarin: »Hver for sig er sangene ikke kedelige, men heller ikke særprægede nok til, at man for alvor lægger mærke til dem, og Eivørs klangrige stemme lyder for det meste som en nedtonet version af Annisette i spidsen for et meget søvnigt ensemble af irske kirkemusikere. Det er lækkert nok, men alt for ensartet i melodi, tempo og indhold.« Ummælarin kallar løgini spinkul og heldur framleiðsluna vera ov bleyta og keðiliga.

# um sjógvi



*Andras Róin, nýggi stjórin á Smyril Line, sær tað sum sína fremstu uppgávu at finna felagnum fleiri bein at standa á*

*Mynd Jens Kristian Vang*

kapasiteturin og tænastustøðið umborð ikki nøktandi. Tað uppstanda køir, bæði í handlunum og á matstøðunum, so tað er nakað, vit fara at gera nakað við nú, sigur Andras Róin.

Hann viðgongur eisini, at kærurnar hava verið nógvar, bæði hvat hesum omanfyri nevnda viðvíkur, men eisini tá tað kemur til reinførið umborð.

- Tá 1300-1400 ferðafólk skulu í land og umborð, og alt skal gerast reint í teirri avmarkaðu tíð sum er, so eru trupulleikar við at náa runt allastaðni. Tað verður so nakað, vit fara at leggja okkum eftir at betra um, sigur Andras Róin.

Annars skal Norröna í dokk í oktober mánaði, og tá er ætlanin at gera fleiri broytingar og ábøtur umborð. Fyrst og fremst skulu stabilatorarnir umvælast. Tað hevur verið ein stórur trupulleiki gjøgnum longri tíð, men stjórin metir, at teir nú hava funnið fram til eina loysn á hesum málinum.

Haraftrat skulu umstøðurnar betrast í handlunum og í galluni. Handlarnir skulu fáa størri pláss og tað skal gallan eisini. Hetta skal gerast á ein slíkan hátt, at tað ikki gongur út yvir kahútt-kapasitetin.

Hetta hevur ikki verið møguligt at gjørt fyrr, tí pengar hava snøgt sagt ikki verið til at gjørt hetta fyri.

Andras Róin sigur, at arbeitt verður hart fyri at finna eitt farmaskip at avloysa Norrönu, meðan hon er í dokk.

### Rutukervið

Nýggi stjórin á Smyril Line sigur, at nýggja rutan til Skotlands hevur víst seg at gingið væl. Fólk hava tikið væl ímóti hesu nýggju leiðini, og sjálvt um roknast má við, at tað tekur tíð at byggja upp eina nýggja rutu, so hevur verið útselt á fleiri túrum til Skotlands.

- Tankin aftanfyri er jú, at vit á tann hátt skulu fáa fleiri fólk til Føroya á veg til Íslands, og tað hevur víst seg at virka væl. Og fyri fyrstu ferð hava vit havt útselt á rutuni til Íslands. Siglingin upp á Hetland heldur uppat í ár, og hóast hetlendingar sjálvandi harmast um hetta, so skilir hetlandski nevndarlimurin í Smyril Line væl, at vit verða noyddir til at reka skipið á fíggarliga forsvarligan hátt, sigur Andras Róin.

Spurdur, um hann ikki óttast fyri, at okkurt annað felag fer at stovna rutu millum Hetland og Føroyar og kanska onnur lond eisini, sigur stjórin á Syril Line, at tann møguleikin er nærliggjandi, men at teir so væl sum gjørligt eru fyrireikaðir upp á eina slíka støðu.

Viðvíkjandi rutukervinum hjá Norrönu sigur nýggi stjórin, at hetta helst verður seinasti veturin, at Norröna fer at sigla upp á Ísland. Tørvurin á einum so stórum skipi er ikki til staðar, og tí roknar Andras Róin við, at talan kann gerast um at leiga eitt skip til farmaflutning.

- Tað hevur ikki verið nøktandi um veturin, men hinvegin er tað eitt øki, sum vit eru við at arbeiða upp, so tað er týdningarmikið, at vit varðveita farmakapasitetin á tí rutuni, sigur Andras Róin.

### Fleiri bein

Nýggi stjórin gongur – sambært honum sjálvum – eini spennandi tíð í møti.

- Fremsta uppgávan verður at útvega felagnum fleiri bein at standa á. Hetta er neyðugt fyri at tryggja felagnum í framtíðini. Eitt felag við einum skipi í rutusigling er ikki serliga stabilt, tað skal ógvuliga lítið til fyri at órógva javnvágina. Og tí mugu vit syrgja fyri, at finna aðrar inntøkur til felagið, sigur Andras Róin.

Hann sigur, at teir fyrst og fremst mugu gera sær dælt av tí, teir framman undan duga og hava royndir við.

- Vit hava fleiri enn tjúgu ára royndir innan ferðafólka- og farmaflutning. Og tað mugu vit útnytta, antin tað so verður at byrja nýggjar rutur ella útbyggja verandi rutur, sigur nýggi stjórin.

Og har eru møguleikarnir fleiri. Tað er jú kent, at Smyril Line í langa tíð lá í samráðingum við Fjord Line um ein samstarvssáttmála, sum tó ikki gjørdist til nakað.

Vit hava í dag tvey bein at standa á, og tey eru ferðafólkaflutningur og farmaflutningur. Ein víðkan kann verða fleiri rutur ella tað kann verða fleiri skip. Tað kann verða vit sjálvir ella í samstarvi við aðrar. Og tað kann verða innan tey bæði økini vit nú eru á, ella tað kann verða eitthvørt, sum liggur tætt upp at tí, sigur Andras Róin, sum nú í eina tíð hevur virka sum stjóri, sjálvt um hann ikki formelt tekur við starvinum, fyrr enn eykaaðalfundur hevur verið og nýggjur nevndarformaður hevur tikið við á Smyril Line.